## Kunningarfundir um hægri lestur í Australia

Eitt vaksandi tal av ungum úr øllum heiminum velja at lesa uttanlands og seinastu árini eru fleiri og fleiri farin til Australia.Í dag eru meir enn 180.000 ung frá meir enn 140 ymiskum londum og lesa í Australia. Millum sviar og norðmenn er Australia eitt av best umtóktu støðum at vinna sær hægri lesnað, men sambært Holger Arnbjerg, frá Altjóða Skrivstovuni, er higartil bara ein føroyingur í Australia og lesur.

Eftir at Altjóða Skrivstovan skipaði fyri lestrarstevnu í heyst hava fleiri ungir føroyingar fingið áhuga fyri Australia. Tí hevur Holger Arnbjerg fingið eina kunningarvitjan til Føroya í lag. Ì dag og í morgin, 14. og 15. apríl, fáa føroysku miðnámsskúlarnir vitjan av Palle Steen Jensen, frá EDU Danmark, og Kristin Skare, frá La Trobe fróðskaparsetrinum í Melbourne í Australia. EDU Danmark er danska umboðið fyri mong altjóða fróðskaparsetur og samstarvar við átta lærdir háskúlar í Australia. Á La Trobe fróðskaparsetrinum í Melbourne eru 27.000 lesandi og teirra millum eru umleið 3.800 útlendingar.

Palle Steen Jensen sigur at tað er eingin loyna hvussu trupult tað er at velja lestrargrein og lestrarstað um ein vil lesa í útlondum, og ofta hava fólk einans atgongd til skriftligt tilfar um ymisku møguleikarnir. Á vitjanini fáa fólk møguleika at práta beinleiðis við hann og Kristin Skare frá La Trope fróðskaparsetrinum, og høvi verður eisini at fáa persónligar samrøður við teir báðar.

Kunningarfundur um hægri lesnað í Australia verður í dag klokkan 15:20-16:00 á Studentarskúlanum í Hoydølum. Í morgin verður kunningarfundur í Studentaskúlahøllini á Kambsdali, kl. 14:20-15:10, og seinni kl. 19:00-20:00 á Handilsskúlanum í Tórshavn. Øll áhugaði eru vælkomin.

**A.B.M**

# Nýtt gistingarhús á Tvøroyri

**Fyri góðum tveimum árum síðani keypti Eirikur Olsen eini hús miðskeiðis á Tvøroyri, undir Heygnum. Húsini vóru í ringum standi, men stór og lógu vakurt við sjóvarmálan. Eirikur fekk eitt hugskot og í næstum opnar "Gistingarhúsið undir Heygnum"**

GISTINGARHÚS
*Annika B. Mortensen*





*Gistingarhúsið undir Heygnum. Sjónvarp er í hvørjum kamari, men annars er útsýnið vakurt yvir Trongisvágsfjørð*

Tá eg ringdi til Eirik, umborð á Grana, segði hann seg verða ógvuliga spentan og hann vónar at ferðafólkatalið til oynna fer at batna nú nýggi Smyril kemur. Eirikur sigur at alt er við at verða liðugt undir Heygnum, "nú skal bara ruddast, vaskast og so skulu nakrar myndir heingjast upp".

"Gistingarhúsið undir Heygnum" er tað fyrst av sínum slagið har suðri. Eingin matstova er, men gestir hava atgongd til køk við øllum hentleikum og møguleiki verður eisini at bíleggja mat uttanífrá. Kostnaðurin fyri eitt dupult kamar verður 350 kr, eitt einstakt kamar kostar 200 kr og eitt høli er eisini ið nýtast kann til vallaraheim. Uttanum gistingarhúsið er væl avbyrgt, so børn kunnu spæla, og atgongd er eisini fyri avlamisakfør. Oman ímóti sjóvarmálanum er eitt stórt øki har møguleiki verður at sita og njóta útsýni tá góðveður er.

Niðri við sjóvarmálan er ein nýggj bátabryggjuna. Eirikur hevur keypt ein deksbát, sum skal liggja við bryggjuna og ætlanin er at gera túrar runt oynna at dyrgja og fiska við tráðu. Pláss verður fyri 12 fólkum umborð. Ein árabátur verður eisini til taks. Hesin skal brúkast til at fara út í fjørðin við. Møguleiki skal samstundis verða hjá seglbátum at leggja at við bryggjuna undir Heygnum, og ferðafólk kunnu so baða sær og fáa ein kaffimunn í gistingarhúsinum.

Eirikur hevur eisini hús í Fámjin og um alt kongur eftir ætlan, kunnu gestir á Gistingarhúsinum í framtíðini fara útferðir til Fámjins. Hetta hugskotið hevur Eirikur fingið av tí at veðurlíkindini í Suðri ofta eru so, at tá mjørki er á Tvøroyri er klárt í Fámjin og øvugt.

"Gistingarhúsið undir Heygnum" fer at lata upp um nakrar vikur og sambært Eiriki hava umleið tjúgu fólk longu bílagt pláss til miðskeiðis í mai mánaða.

# Eivør Pálsdóttir og føroysk mentan á oljumessu

LISTASTEVNA
*Annika B. Mortensen*

Tá oljumessa verður í Stavanger í august mánaða verður eisini skipað fyri mentanartiltøkum á havnarøkinum. Nevndin sum fyrireikar hvussu Føroyar og føroyska mentannin skulu sýnast fram váttar at Eivør Pálsdóttir fer at luttaka.

Samstundis við at ONS oljumessan verður hildin, 24.-27. august, verður eisini skipað fyri einum ONS festivali á bryggjuni í Stavanger. Jens Marius Poulsen, sum er í fyrireikingarnevndini fyri Tórshavnar Kommunu, sigur at eitt stórt tjald verður karmur um mentanar tiltøkini og at ætlanin er at hava mangt á skránni. Birgir Enni skal borðreiða og skipa fyri sølu av mati og drykkjuvørum. Søla verður av føroyskum pløggum og prýðislutum. Johanna skal liggja við bryggju og ætlanin er at fáa harmoniku tónleik umborð. Kristian Blak fer at luttaka og Eivør Pálsdóttir hevur eisini jattað at verða við. Sambært Jens Marius Poulsen verður ein stórur pallur við pláss fyri umleið 20.000 áhoyrarum á ONS festivalinum, og tað er á hesum at Eivør Pálsdóttir fer at hava sína framførslu. Jens Marius leggur afturat, at enn eru øll tiltøkini ikki komin til sættis og at arbeitt verður við at fáa tað fíggjarliga loða saman.

Í fyrireikingarnevndini til ONS festivalin eru: Malan Johansen, frá Vinnuhúsinum, Jákup Simonsen og Jens Marius Poulsen, frá Tórshavnar Kommunu, Rannvá Troest, frá Runavíkar Kommunu, Ann-Marie Wang, frá Smyril Line, Maria á Lofti, frá Atlantic Airways, Rúna á Lofti, frá Ferðaráð Føroya og Birgir Enni skipar fyri sølu av drykkjuvørum og mati.



Danskt lógaruppskot:

# Læknar skulu góðkenna foreldur

**Kemur nýggja danska lógin í gildi, er tað ein spurningurin, um danska sjúkrahúsverkið er sinnað at veita føroyskum pørum viðgerð fyri barnloysi, uttan so at tey lúka somu treytir, sum danir**

GÓÐKENNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Petur Ellefsen, læknastjóri*

Í einum nýggjum lógaruppskoti leggur danska stjórnin nú upp til, at læknar skulu meta um pør, sum ynskja viðgerð fyri barnloysi, eru skikkaði sum foreldur. Eftir ætlan skal lógin setast í gildi í 1. oktobur í ár.

Í uppskotinum verður sagt, at læknar skulu meta um, hvønn uppvøkstur og hvørjar umstøður barnið hevur útlit til.

– Eru úlitini vánalig, skulu læknar hava heimild í lógini til at nokta parinum ísáðing ella aðra viðgerð fyri barnloysi, sigur Lars Løkke Rasmussen, heilsumálaráðharri.

### Læknar nokta

Metingin skal forða fyri, at ábyrgdarleys fólk ella fólk við álvarsomum sosialum trupulleikum fáa børn, ið mugu takast frá teimum seinni. Heilsumálaráðið vísir á tvey dømi, har børn, ið vóru fødd eftir viðgerð fyri barnloysi, máttu tvingsilsflytast beint eftir, at tey vóru fødd. Ráðið væntar ikki, at talan verður um at sálda nógv pør frá, men sum er, gevur lógin ikki heimild til tað, og tað er ábyrgdarleyst, staðfestir ráðið.

Men danskir læknar vísa uppskotinum aftur, tí teir vilja ikki átaka sær leiklutin sum dómarar.

– Tað er ørkymlandi, at læknar skulu átaka sær rætt til at gera av, hvørji fók eru skikkaði sum foreldur, tí tað eru vit kanska ikki tey røttu at døma um, sigur Jesper Poulsen, formaður í danska læknafelagnum.

Danska etiska ráðið stuðlar uppskotinum, men ásannar, at talan er um eina ógvuliga álvarsama uppílegging.

– Tí eiga vit sum minsta krav at hava eina skipan, har tað eru serfrøðingar á økinum, sum meta um sosialu støðuna, og har tað er møguleiki at kæra avgerðina, sigur Mette Harlev, limur í etiska ráðnum.

### Eitt mannarættindi

Danska lógin um viðgerð fyri barnloysi er ikki galdandi í Føroyum, men higartil hava føroyskir læknar hildið seg til somu reglugerð, sum danskir læknar.

– Vit hava umrøtt reglurnar fyri ísáðing, men ikki í sambandi við nýggja uppskotið hjá donsku stjórnuni. Í Føroyum verður viðgerð fyri barnloysi fatað sum ein rættur, øll pør hava, um tey lúka galdandi treytir um aldur, hjúnarstøðu og tal av børnum, tey eiga frammanundan. Mær vitandi, hava sosialar umstøður ongantíð verið viðgjørdar sum liður í teimum viðmælum, ið verða gjørd, tá pør verða send í viðgerð fyri barnloysi, sigur Petur Ellefsen læknastjóri í stuttari viðmerking.

### Somu treytir?

Sum er, verða føroyingar sendir til Danmarkar í viðgerð fyri barnloysi, og verða tá mettir sum sjúklingar hjá Ríkissjúkrahúsinum. Kemur nýggja danska lógin í gildi, er tað ein spurningurin, um danska sjúkrahúsverkið er sinnað at veita føroyskum pørum hesa viðgerð, uttan so at tey lúka somu treytir, sum danir.

## Føroyingar hittast í London

**Leygarkvøldið verður skipað fyri hugnakvøldið við filmi, mati o. ø. í London**

HUGNAKVØLD

Leygarkvøldið tann 24. apríl verður aftur møguleiki hjá føroyingum búsitandi í Stóra Bretlandi at hittast.

– Øll eru vælkomin, sigur ein av stigtakarunum, Dánjal Rein.

Um alt gongur eftir ætlan verður byrjað við at hyggja eftir dokumentarfilminum hjá Ullu Boje Rasmussen, Færøerne.dk, sum hevði frumframførslu í Føroyum síðsta summar og hevur fingið góð ummæli. Filmurin hevur enskan undirtekst, so til ber at bjóða vinum og kenningum við, sum annars ikki skilja føroykst.

Síðani verður farið út at eta á eini italienskari matstovu, Dolce Vita. Til ber at fáa tríggjar rættir fyri £20 íroknað borðfæ. Boðið frá um vegetarmatur ynskist. Drykkuvørur eru ikki íroknaðar.

Bæði støðini liggja 2 min frá Elephant & Castle Tube-station og 5 min frá Waterloo-station.

Til ber a faá innivist a Soutwark Rose Hotel fyri 85£ pr. kamar pr. nátt, írokn. full English breakfast. Hotellið liggur við London Brigde, 10 min, frá Elephant & Castle.

Áhugað verða biðin um at tekna seg hjá Dánjal Rein við at senda ein teldupost til danjalrein@msn.com. Freistin at tekna seg er fríggjadagin 16.apríl.

# Havnar Jazz Festival

**Ein nýggjur Jazz Festivalur fer at ríka Havnagotur við tónleiki í summar. Heitið verður Havnar Jazz Festival, og tað er Havnar Jazzfelag, ið skipar fyri**

JAZZFESTIVALUR



*The Grand Old Man inann jazz í Føroyum, Brandur Øssursson er fluttur til Danmarkar. Við honum er gamli Jazzð, fólka- og bluesfestivalurin farin í søguna. Men nú er tað Havnar Jazzfelag, ið tekur stig til nýggjan jazzfestival*

Eftir at gamli Jazz, fólka og blues festivalurin fór í søguna, er nú ein nýggjur festivalur á gáttini. Tað er Havnar Jazzfelag, sum síðani 1975 hevur skipað fyri konsertum í Havnini, ið tekur stig til nýggja festivalin.

Jazz, fólka og blues festivalurin hevur verið hildin á hvørjum ári síðan 1984 undir leiðslu av Brandi Øssursson, men við tað at Brandur flutti aftur til Danmarkar, eftir at hann fór frá við eftirløn um heystið 2003, er harvið hendan hátíðarstevnan hildin uppat.

Havnar Jazzfelag hevur síðani miðvíst arbeitt fyri at stovna ein nýggjan festival, sum skal fylla tað tómrúm, ið gamli festivalurin lat eftir seg. Hetta er gjørt i samstarvi við Brandur Øssurson, ið hevur givið sína hjálp og sín stuðul til tiltakið.

### Øðrvísi karmar

Nýggi festivalurin far heitið Havnar Jazz Festival, og verður samstundis eitt sindur øðrvísi enn tann gamli. Konsertirnar vera ikki longur hildnar eina í Norðurlandahúsinum eins og undanfarin ár, men í Sjónleikarhúsinum, smærri spælistøðum í Havnini og eisini í Havnargotum. Soleiðis fær festivalurin ein meira festivalkendan dám. Dentur verður á hesum fyrsta sinni lagdur á Norðurlendskar og Kanadiskar bólkar.

### Nøvn á festivalinum

Festivalurin verður frá døgunum 28. juni til 4. juli, og nógv spennandi nøvn eru longu komin á skránna. Nevnast kunnu til dømis New Jungle Orchestra (DK), sum hevur verið eitt av allarbestu jazz orkestrum í Europa í nógv ár og sum nú eru floguaktuellir við Live from Birdland. Heimskenda diskostjørnan úr Kanada, Geraldine Hunt, ið millum annað hevur gjørt og sungið lagið, Can't fake the Feeling, er við á festivalinum. Hon fer her at spala saman við The Arnold Ludvig Trio. Nicolas Hill and the universals (DK) og Jussi Kannaste Quartet frá Finnlandi eru eisini við.

Eisini er dentur lagdur á at fáa nógv góð føroysk nøvn á skránna, so sum fløguaktuellu ENEKK, Eivør Pálsdóttir, Hans Petur's kvintett, vísusangaran Hanus Johansen og onnur.